

*Poul Michelsen, limur í Grundlógarnevndini, er sinnaður at taka Javnaðarflokkin upp á orðið og brúka útspælið hjá flokkinum til at finna eina semju í tjóðskaparmálinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Hurðin gloppar fyri semju

**Løgtingsmaðurin Poul Michelsen gloppar dyrnar og bjóðar Javnaðarflokkinum inn í hitan. Tíðin er komin at finna eina semju í sjálvstýristilgongdini, heldur hann, og staðið at finna semjuna er Grundlógarnevndin. Fæst ein semja fer at bera til at føra politikk í Føroyum, har breiðar semjur eru grundarlagið undir politikkinum**

SJÁLVSTÝRI
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tíðin er komin at fáa Javnaðarflokkin inn aftur í hitan.

Tað heldur løgtingsmaðurin hjá Fólkaflokkinum, Poul Michelsen, sum eisini er limur í Grundlógarnevndini. Hann undirstrikar, at hetta ikki er viðgjørt í Fólkaflokkinum, men hann heldur tíðina vera búnað til, at í minsta lagið Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin finna eina breiða semju í sjálvstýristilgongdini.

Javnaðarflokkurin hevur gingið oyðimarkargongd í føroyskum politikki í sjey ár, og tað er óhoyrt fyri flokkin. Líka síðan fullveldislandsstýrið tók við í 1998 hevur tann breiða semjan verið eftirlýst í tjóðskaparmálinum, men so leingi Javnaðarflokkurin hevur verið uttanfyri, hevur meirilutin fyri fullveldi verið teppur. Landsstýrið hevur gjørt fleiri miseydnaðar royndir at fáa Javnaðarflokkin við. Eitt nú varð samráðingaruppleggið broytt, so tað líktist sjálvstýrisleistinum hjá Javnaðarflokkinum, men líka lítið hjálpti.

Hví skal tað so bera til nú?, spyrja vit Poul Michelsen. Hann vísir til síðsta útspælið hjá Javnaðarflokkinum við yvirskriftini »Tjóðskaparlig semja í sjálvstýrismálinum«.

– Eg taki hetta sum eitt tekin frá Javnaðarflokkinum um, at flokkurin er til reiðar at endursamráðast um eina møguliga felags niðurstøðu. Javnaðarflokkurin er í eini lyklastøðu, og tað hevur verið ótrúliga lítil munur á honum og okkum. Útspælið hjá flokkinum hevur eitt skap, sum vísir, at vit í allari fordragiligheit eiga at finna eina tjóðskaparliga semju í eini tíð, tá onnur realpolitisk mál rópa eftir at vera loyst, sigur Poul Michelsen.

## Semja í nevnd

Sjónarmiðini hjá Poul Michelsen eru áhugaverd, tí hann er sannførdur fullveldismaður, og kortini heldur hann tað bera til at gera semju við flokkin, sum hevur stríðst harðliga ímóti fullveldisætlanini hjá landsstýrinum.

Staðið at finna semjuna er Grundlógarnevndin, har allir politisku flokkarnir eru umboðaðir, heldur Poul Michelsen. Tíðin hevur longu mýkt partarnar nógv, og í Grundlógarnevndini er góð fatan millum partarnar.

Javnaðarflokkurin hevur longu sett Grundlógarnevndini stólin fyri hurðina. Er eingin tjóðskaparlig semja orðað í nevndini innan 1. januar 2004, so tekur flokkurin seg úr nevndini. Poul Michelsen heldur tað eigur at bera til. Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin eru hugaðir at finna eina semju, Tjóðveldisflokkurin noyðist eisini at spæla við, um alt ikki skal detta á gólvið, men Sambandsflokkin heldur hann ikki vera áhugaverdan, tí hann grundar allan sín politikk á danskan stuðul.

– Sjálvstýrisneistin kódnar ongantíð, og hann heldur fram at nørast. Tað mugu vit gera okkum greitt. Í Javnaðarflokkinum eru fólk, sum leggja trýst á leiðsluna um, at hon finnur eina loysn í tjóðskaparmálinum, ið peikar frameftir. Onnur fólk vilja ikki hava broytingar. Vit eru í somu støðu í Fólkaflokkinum. Tjóðveldisflokkurin vil hava fullveldi, og onkursvegna mugu vit samansjóða øll tey sjónarmiðini, so vit kunnu frígeva orku at fara undir stórar realpolitiskar uppgávur í Føroyum, sigur Poul Michelsen.

Lykilin til eina semju liggur í Grundlógarráðstevnuni, heldur Poul Michelsen, har Hans Pauli Strøm, skrivari í Javnaðarflokkinum, gjørdi seg til talsmann fyri einari tvíbýttari loysn.

Í stuttum snýr tað seg um at gera ein sáttmála, sum staðfestir, hvussu vit virka í einum felagsskapi við Danmark, og hevur greiðar mannagongdir fyri, hvussu føroyingar taka fullveldi. Sostatt skal ein partur snúgva seg, hvussu vit virka í verandi støðu, og ein partur skal snúgva seg um, hvussu vit bera okkum at, tá vit fara úr ríkinum. Sáttmálin skal fráboðast ST, so tað er greitt, at danski staturin stuðlar føroyska leistinum. Eisini um vit velja fullveldi.

## Smáir flokkar valda

Tá tjóðskaparmálið er loyst, verður lættari at føra politikk í Føroyum, heldur Poul Michelsen. Hann sigur, at fíggjarlógarviðgerðin avdúkaði, at samgongan hevur selt seg ov dýrt við at geva teimum smáu flokkunum so stórt vald.

– Hvør maður er averandi atkvøðan hjá samgonguni, og tí ber til í tíð og ótíð at hótta við at taka sín stuðul aftur. Fíggjarlógin var tað bera møsn og kegl, har serliga teir smáu flokkarnir hóttu við sliti, um teir ikki fingu sín vilja. Tað forðar fyri einum breiðum føroyskum konsensuspolitikki. Fáa vit frið í tjóðskaparmálinum, so verður tíðin búgvin at gera semjur, sigur Poul Michelsen.

Hann sær tvær myndir fyri sær, tá ein tjóðskaparsemja er fingin. Onnur er, at Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin skipa eina breiða samgongu, ið skal virka fyri at gera Føroyar sjálvbjargnar. Hin er ein minnilutastjórn millum Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin, har Tjóðveldisflokkurin er stuðulsflokkur. Men tað er alt gitingar, viðgongur hann.

– Kjarnin er, at vit fáa frið í Føroyum at føra politikk. Tað gerst bara við semju í tjóðskaparspurninginum. Vil Javnaðarflokkurin upp í aftur, so má hann eisini vísa sín vilja í verki og ikki bara krevja sítt. Eg havi onki ímóti at rætta teimum hondina, sigur Poul Michelsen.

### Fakta

Útspæl Javnaðarfloksins:

Semja skal gerast við Danmark um ein politiskan sáttmála millum tvey sjálvstøðug lond, ið viðurkenna hvørt annað sum javnbjóðis tjóðir í einum felagsskapi – ríkisfelagsskapi, samveldi ella frælsum felagsskapi.

Sáttmálin staðfestir, at føroyinar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætitt, og Føroya løgting og landsstýrið eru hægsti myndugleiki í Føroyum.

Sáttmálin ásetir ávísa mannagongd, um Føroyar vilja taka seg úr samveldinum. Hann skal fráboðast ST, so hann fær altjóðarættarligt gildi.



# Sama uppskot sum í 2000

**Høgni Hoydal fegnast um, at Javnaðarflokkurin hevur sett sær nýggj mið á sjálvstýrisleið. Hann heldur, at ætlanin hjá Javnaðarflokkinum við einum sjálvstýrissáttmála millum Danmark og Føroyar líkist nógv uppskotinum, sum samgongan longu samráddist við danir um í 2000**

UPPSKOTIÐ HJÁ JAVNAÐARFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal fegnast um, at Javnaðarflokkurin hevur sett sær nýggj mið á sjálvstýrisleið. Hann heldur, at ætlanin hjá Javnaðarflokkinum við einum sjálvstýrissáttmála millum Danmark og Føroyar líkist nógv uppskotinum, sum samgongan samráddist við danir um í 2000.*

*Mynd: Savnsmynd*

Formaður Tjóðveldisflokksins, Høgni Hoydal, fegnast um, at Javnaðarflokkurin hevur sett sær nýggj mið á sjálvsstýrisleið. Í farnu viku kom eitt skriv frá Javnaðarflokkinum um, at flokkurin ynskir eina breiða tjóðaskaparliga semju í sjálvstýrismálinum. Javnaðarflokkurin rør frammundir, at Heimastýrislógin er ikki longur nøktandi, og skipanin átti at verið skift út við ein sonevndan sjálvstýrissáttmála millum Føroyar og Danmark. Høgni Hoydal, ið meir enn nakar annar hevur gingið undan í fullveldismálinum, heldur, at skrivið hjá Javnaðarflokkinum er eitt stórt framstig, tí higartil hevur verið torført at funnið eina semju við Javnaðarflokkin um sjálvstýrismálið, men møguliga eru glottar fyri framman.

## Sama ætlan

Høgni Hoydal heldur kortini ikki, at ætlanin hjá Javnaðarflokkinum kann fremjast í verki.

– Ætlanin hjá Javnaðarflokkinum er ikki annað enn uppskotið, vit samráddust við danir um í 2000. Vit tosaðu eisini um ein frælsan felagsskap við tveimum javnbjóðis pørtum, men tað eydnaðist ikki at finna nakra semju við donsku myndugleikarnar, og tí haldi eg, at tað vildi verið órealistiskt, at danir høvdu góðtikið somu ætlan í dag, sigur Høgni Hoydal

Høgni Hoydal, sum í løtuni er staddur í Íslandi, har hann luttekur á einari KT-ráðstevnu, sigur, at tað er ein sannroynd, at ætlanin frá 2000 ikki bar á mál, og tí var neyðugt, at samgongan vendi tilgongdin í sjálvstýrismálinum.

Hann vísir á, at danir ikki eru áhugaðir í, at føroyingar fáa fullveldið, og tískil valdi samgongan at leggja seg eftir at fáa praktisku forðingarnar av vegnum. Her sipar formaðurin í Tjóðveldisflokkinum til, at blokkstuðulin er minkaður við einum triðingi í ár og at samgongan arbeiðir í løtuni við at tøma Heimastýrislógina, sum hann málberð seg.

## Ansa okkum

Høgni Hoydal hevur javnan víst á, at tað er ómetaliga týdningarmikið, at føroyingar ikki binda seg til nakran sáttmála við danir, har tað endaliga verður staðfest, at vit ikki hava evsta vald í Føroyum, tí tað kann hava ræðandi avleiðingar við sær. Ætlanin hjá Javnaðarflokkinum fevnir um, at Danmark og Føroyar gera ein sjálvsstýrissáttmála, ið skal fráboðast í ST.

– Vit mugu fyri alt ikki binda okkum til ein sáttmála, har ivi kann vera sáddur um, hvør hevur evsta vald í Føroyum, tí so verður enn torførari at røkka á mál í sjálvstýrismálum. Vit hava eisini ásannað, at ST er ikki til at spæla við (Norðuratlantsbólkurin verið í New York herfyri, blðm), greiðir løgmálaráðharrin frá.

## Breiða semjan

Spurdur, um møguleikin fyri breiðu semjuni um sjálvstýrismálið er betraður, nú Javnaðarflokkurin hevur flutt seg í málinum, svarar Høgni, at samgongan sjálvsagt er áhugað í at fáa so breiða semju sum gjørligt um sjálvsstýrismálið.

– Vit høvdu fleiri fundir við Javnaðarflokkin í 2000 um ein semju, áðrenn vit fóru til samráðingar við danir, men tað gekk ikki. Núverandi arbeiðið í grundlógarnevndini er ein goður møguleiki fyri at finna eina semju millum samgonguna og andstøðuna um tað ríkisrættarliga, og tað vóna vit sjálvsagt hendir, sigur Høgni Hoydal at enda.

# Barnaprixið á fløgu



Mánadagin kom fløgan við sangunum frá Nósabarnaprixnum 2003 út á fløgu. Tað eru finalistarnir frá kappingini, sum framføra sínar sangir á fløguni

Tey sum syngja á fløguni eru: Durita Mohr Jacobsen, Rebekka Rafael Petersen, Manja Johansen, Terji Højgaard, Ansa Højgaard, Durita Djurhuus, Jóna Poulsen, Soffía Lind Rasmussen, Súsanna Samró, og Konni Kass Jacobsen, sum gjørdist vinnari av kappingini við lagnum »Syngja sama lag«.

Eisini er eitt nýtt »Nósalag«, sum James Olsen syngur, og hetta lag hevur ivaleyst møguleika at verða nógv spælt í næstum.

Fløgan og tiltakið er stuðlað av Føroya Banka, og fløgan fæst til keyps um alt landið.

# Almennur fyrilestur um ES

TÍÐINDASKRIV

Fríggjakvøldið 24. oktober kl. 19:30 skipa Sambandsflokkurin og Vinnuhúsið fyri almennum fundi í Útvarpshøllini um ES.

Fríggjakvøldið 24. oktober kl. 19:30 skipa Sambandsflokkurin og Vinnuhúsið fyri almennum fundi í Útvarpshøllini um ES.

Á fundinum fer Evropapolitiski stjórin hjá Dansk Industri, Lykke Friis, at halda ein fyrilestur um ES við heitinum "Stormester eller skakmat - EU's forfatningstraktat".

Lykke Friis er 33 ára gomul, og hevur holla vitan um ES. Hon er útbúgvin cand.scient.pol. í 1993 og varð ph.d. í 1997. Hon hevur skrivað nógvar bøkur og greinar um ES, og hevur m.a. arbeitt í danska Vinnumálaráðnum og sum granskingarstjóri í danska Uttanríkispolitiska stovninum.

Á fundinum verður møguleiki at seta henni spurningar um ES.